# Stýrisfundarbók FKF

## 09-03-2010 / 5

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10.00

*Fundur lokin kl:* 12.30

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Hans Jákup Kallsberg | Avboð |
| Asbjørn Djurhuus form. | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | Ikki møttur |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Delmar Tausen | Ikki møttur |
| Herálvur Jacobsen | Avboð |
| Johan Christiansen | |
| Karl A. Olsen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | Avboð |

**Fundarmál nr: 14**

FKF Jour. nr: 09-075

Reist av: Almannaráðnum

Fundarmál: Børn & ung, tilboð og skipanir

Málslýsing: Í telduposti dags 9. februar, bjóðar Almannaráðið felagnum, at viðmerkja: Uppskot til endurskoðan av tilboðum og skipanum til børn, ung og familjur við serligum tørvi. At taka upp frá seinasta fundi. Sí álitið, skjal nr. 14.

Viðmerkingar:
1. Ein greiningarmiðstøð skal gerast, sum skal vera landsstovnur,
2. "Eina hurð meginreglan", álitið leggur upp til, at kommunan umsitur,
3. Stovnarnir og stuðulsfólkaskipanin verða skipa undir einum felagskommunalum stovni.

At taka upp frá seinasta fundi.

Fundarsamtykt: Stýrið tekur undir við, at málsviðgerðin liggur so tætt at borgaranum sum møguligt. Hugtakið "ein hurð" er framstig fyri brúkaran.

Greiningardepilin eigir at vera landsins. Landið er ov lítið til annað.

Taka ikki undir við felagskommunalum stovni sum eru ásettur við lóg, tí i talan er ikki um kommunalan stovn. Kommunurnar kunnu sjálvar skipa seg, um økið verður lagt út.

Neyðugt er at taka fíggingina til viðgerðar innan møguliga yvirtøku.

*Støða: 1. hoyringssvar FKF jour 09-75_5 sent AMR 7. mars.*

**Fundarmál nr: 17**

FKF Jour. nr:

Reist av: KAF

Fundarmál: KAF, mál fyri aðalfund 2010

Málslýsing: Í telduposti dagf. 1. mars, boðar KAF til aðalfund 26. mars 2010.

Mál, sum FKF ynskir at fáa fyri aðalfundin, skulu vera KAF í seinasta lagi 12. mars.

Fundarsamtykt: Ongin mál at senda KAF.

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 18**

FKF Jour. nr: 09-078

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Skálafjarðartunnel, lógaruppskot

Málslýsing: Í telduposti dagf. 18. februar, bjóðar Innlendismálaráðið felagnum at viðmerkja løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð. Sí skjal 18 1.

Av tí at freistin til viðmerkingar var 24. februar, er hoyringsskriv sent IMR. Stýrið er kunnað via fkf.fo. Sí skjal 18 2.

Viðmerkingarnar eru fingnar frá Nes kommunu.

Fundarsamtykt: Tikið undir við viðmerkingunum.

*Støða: Svarskriv FKF jour nr 09-78:2.1 sent IMR 27. februar 2010.*

**Fundarmál nr: 19**

FKF Jour. nr: 09-079

Reist av: Mentamálaráðið

Fundarmál: MVG, broytingaruppskot

Málslýsing: Í telduposti dagf. 2. mars, bjóðar Mentamálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald, sum gjørt er í samráð við Fíggjarmálaráðið. Sí skjal 19.

Um uppskotið:
Skipanin skal koma í staðin fyri stuðulin á løgtingsfíggjarlógini, har ásettar hava verið 660 tkr. Til ungdóms- og bygdarhús og einar 3 mió.kr. Til ítróttaanlegg.

Broytingin hevur við sær, at ávísar íløgur yvir eina milj. Fáa endurgoldið mvgið, um verklagið lýkur treytirnar sum lógin ásetur.

Ein nevnd sett av MMR, við umboðum m.a. Frá FKF, góðkennir verkløg og ger tilmæli til TAKS.

Í viðgerðini av umsóknum, skal nevndin tryggja landfrøðiligan jávnað og taka atlit til heildarætlanir innan mentan og ítrótt.

Viðmerkingar:
1. LSM fær stýrt hvar løgurnar koma at liggja
2. Samstørv millum fleiri byggiherrar kann vera ein avleiðing
3. Í uppskotinum §3, stk 1 eru kommunur nevndar at koma undir lógina, meðani í §3, 2 pkt. 1, har lsm ger reglur og treytir, eru kommunur ikki nevndar.

Fundarsamtykt: Kostnaðarmarkið 1. milj. ger at fleiri verkætlanir og eisini áhugafeløg koma helst ikki at fylla treytirnar.

Treytirnar viðv. altjóða normum ger at t.d. Minni ítróttarvelllir /høli ikki eru við.

Nevndarumboðan; kommunanna luttøka.

*Støða: Í bíðistøðu*

**Fundarmál nr: 20**

FKF Jour. nr: 09-080

Reist av: Formanninum

Fundarmál: Agenda Ráðgjavi, setanarbólkur

Málslýsing: Til starvið eru innkomnar 9 umsóknir.

Setanarbólkur: Bergmann, Sveiney, Johan, Asbjørn.

Fundarsamtykt: Samtykt

*Støða: Avgreitt.*

YmistQReport

**Frágreiðingar**

1. Frágreiðingar frá bólkaumboðum síðani seinasta fund.

2. Spatial Forsight: frágreiðing 1. fundin: BF, 09-56.
Greiðir frá fundinum.

3. Vitjan frá Estonia: frágreiðing ssd.
Greiðir frá uppskoti til skrá.

**Ymist**

1. Umboðsráðsfundurin, eftirmeting, 09-64.
Onngar viðmerkingar.

2. Samanlegging av kommunufeløgunum, 09-19.
Formaðurin biður um fund við formann KSF at umrøða málið.

3. Klaksvíkarskjalið.